# Eyka Pipar & Salt-framførsla

**ANSO letur Pipar & Salt fáa Norðurlandahúsið til ekstraordinera framførslu fríggjakvøldið**

UNDIRHALD

ANSO - felagsskapurin hjá lesandi samkyndum í Norðurlondum - heldur til í Norðurlandahúsinum alla hesa vikuna. Men fríggjakvøldið 26. august hevur felagsskapurin einki á skránni í húsinum, og orsakað av ovurstóra áhuganum fyri framførslunum hjá Pipari & Salti, hevur ANSO gjørt av at lata Jákup, Sjúrð, Kim og James sleppa inn at framføra hetta kvøldið.

Atgongumerki til ta ekstraordineru framførsluna fríggjakvøldið fáast á vanligum støðum.

# Ungdómsvikuskifti í Kollafirði

**Komandi vikuskifti verður serligt ungdómsvikuskifti í Missiónshúsinum í Kollafirði**

UNGDÓMUR

Nú summarfrítíðin er av, og annað virksemi byrjar aftur, ætla tey í Kollafirði at hava eitt vikuskifti við ungdómsmøtum í Missiónshúsinum.

Møtini verða fríggjakvøldið komandi kl 19.30 við luttøku úr Miðvági, leygarkvøldið kl 19.30 við luttøku úr Fuglafirði og sunnukvøldið kl 18 við luttøku av Glyvrum. Á skránni verður sangur, tala, vitnisburður og drama.

Aftaná verður bjóðað okkurt til matna uppiá, og eru øll vælkomin til hettar ungdómsvikuskifti, siga fyrireikararnir, sum síggja fram til nøkur hugnalig kvøld.

# Bæði almenn og privat gransking

ÚTBÚGVING OG GRANSKING

Hóast Akureyri í Íslandi er ein býur á støðd við Havnina, er har ein lærdur háskúli sum hevur gjørt gransking og undirvísing til eina stóra vinnu. Har eru hundraðtals studentar og bæði almenn og privat gransking.

Hóskvøldið 25.august kl.19.30 verður almennur fyrilestur í Norðurlandahúsinum um møguleikarnar hjá føroyingum at lesa á Akureyri og møguleikarnar fyri samstarvi við føroyingar um gransking.

Á fundinum fara Mikael M. Karlsson og Ágúst Þór Árnason á Samfelagsfrøði- og løgfrøðideild Háskólans á Akureyri at greiða frá um millum annað eina skrá um rættindini á norðurpól- og suðurpóløkjunum. Eisini fer Kári á Rógvi at siga nøkur orð um, hvussu tað er sum føroyingur at virka í útbúgving og gransking í Íslandi.

Norrøna Felagið í Føroyum skipar fyri almenna fundinum í Norðurlandahúsinum hóskvøldið kl.19.30.

# Countryfestivalur við íblástri úr Nashville



**Seks av teimum, sum fara at spæla á countryfestivalinum í Vestmanna leygardagin 17. september, koma á festivalin við nýggjum íblástri úr Nashville, Tennessee, har fleiri føroyskir tónleikarar vitja í hesum døgum. Fleiri av Føroya fremstu tónleikarum og country- og gospelsangarum verða á festivalinum, og Hallgrím Miðberg, ið yrkti kendasta føroyska country-sangin, »Eg siti so eina«, fer at syngja sín egna sang, sum Vestmenn góvu út á plátu í 80'unum**

COUNTRYFESTIVALUR

Nógvar kendar føroyskar country- og gospelrøddir og góðir tónleikarar verða at hoyra á country-festivalinum í Vestmanna 17. september. Undan festivalinum vitja fleiri teirra í Nashville, Tennessee, sum er altjóða høborgin hjá country-tónleikinum.

Ólavur Højgaard, Martin Joensen, Hallgrím Miðberg, Magni Christiansen, Jóannes Ólavsson og Jákup Zachariassen eru allir kendir frá countrytónleiki og gospeltónleiki. Teir verða at hoyra á countryfestivalinum, men undan festivalinum fara teir í tveimum bólkum til Nashville, har teir millum annað fara í upptøkuhølir. Helst koma teir aftur fullir av íblástri til countryfestivalin í Vestmanna, ið ivaleyst kann metast sum føroyska høborgin hjá countrytónleikinum.

Aðrir sangarar og tónleikarar á festivalinum verða Jóan Magnus Danielsen, Sólvá Ford, Øssur Christiansen, Ólavur Øster, Jónleif Jensen, Petur Jacobsen, Eyðun Johannesen, Jógvan Olsen og Pauli Magnussen.

## Eg siti so eina

Tann kendasti føroyski country-sangurin, »Eg siti so eina«, hevur sín uppruna í Vestmanna. Hallgrím Miðberg, sum er vestmenningur, yrkti sangin í sekstiárunum, tá country- og rokktónleikurin blómaði í bygdini. Á festivalinum fer hann at syngja sín egna sang saman við Vestmonnum, sum veruliga gjørdu sangin kendan í áttatiárunum, tá teir góvu hann út á plátu.

Skráin fyri festivalin er í fýra pørtum. Martin Joensen fer at undirhalda á Fjørðukrónni seinnapart leygardag. Klokkan 20.00 verður Country-gospel konsert í ítróttarhøllini. Eftir konsertina verður »countrylive« á Bryggjuni, og undan dansinum, sum byrjar í ítróttarhøllini um miðdnáttarleitið, verður framsýning í »line-dansi«. Fólk, sum fara á skeið í »line-dansi« í Vestmanna vikuskiftið 9. og 10. september, fara saman við øðrum line-dansarum at vísa síni dansikynstur. »Line-dansur« verður á skránni nakrar ferðir undir almenna dansinum.

## Kampingpláss

Á festivalinum verður havnarlagið mitt í Vestmanna skipað sum kampingpláss, og sostatt verður møguligt at fara á countryfestivalin við húsvogni.

Umframt tónleikin, verður borðreitt við góðum mati. Á Fjørukrónni verður meksikanskt sjálvtøkuborð, og matur verður eisini seldur aðrastaðni í bygdini. Fyrireikararnir siga, at alt verður at fáa til »cowboyarar« hendan dagin, uttan hestarnir, sum teir sjálvir mugu hava við.

Ætlanin er, at Countryfestivalurin verður eitt afturvendandi tiltak tíðliga um heystið fyri ikki at órógva summarfestivalarnar og stevnurnar.

Ein arbeiðsbólkur, sum javnan hevur skipað tiltøk fyri VÍF og onnur feløg í Vestmanna, fyrireikar festivalin. Í ár hevur bólkurin valt at lata avlopið av tiltakinum fara óskert til Vestmanna Talvfelag.